**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 60/2023: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri januar 2024** (Varpið)

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Beinir Johannesen og Árni Skaale, løgtingsfólk, hava lagt málið fram 23. januar 2024, og eftir 1. viðgerð 13. februar 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 29. februar 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Klaksvíkar kommunu, Grunnin Mentanarhús í Klaksvík og landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg.

Fíggjarnevndin játtaði 7 mió. kr. til Varpið í álitinum til fíggjarlógina fyri 2023, og sostatt eru játtaðar 12 mió. kr. tilsamans. Upprunaumbønin frá stigtakarunum var 15 mió. kr.

Nevndin ásannar, at gongdin í hesum málinum hevur verið heldur tilvildarlig, um samanborið verður við játtan til líknandi verkætlanir, og hevur eftirlýst eina greiða mannagongd fyri játtanir av hesum slag.

Fyri at ganga upprunaumbønini á møti mælir ein samd nevnd til at játta írestandi upphæddina á 3 mió. kr.

Nevndin ger, enn einaferð, vart við, at greiðar mannagongdir, fyri játtanir av hesum slag, eru neyðugar og eiga at verða settar í verk, áðrenn játtað verður til fleiri verkætlanir av hesum slag.

Nevndin setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 12 Almanna- og mentamál

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **12.24.3.** | **Mentanararvur** | | | |
| 33. | Mentanarhús í Klaksvík, løgustuðul (Stuðulsj.) | J | - | - |
| | | **EYJ** | **3.000** | **-** |

**Viðmerking til broytingaruppskot**
Við broytingaruppskotinum verður eykajáttanin til endamálið lækkað úr 5 mió. kr. niður í 3 mió. kr.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 18. apríl 2024**

Eyðgunn Samuelsen
forkvinna

Beinir Johannesen
næstformaður

Bjarni Hammer

Eirikur í Jákupsstovu

Hanna Jensen

Magnus Rasmussen

Steffan Klein Poulsen